## Dýrt byggilendi

Ætlar tú tær til Íslands at búgva og at byggja tær hús har, eigur nú neyvan at leita eftir einum grundstykki á Arnarnesi í Reykjavík. Tað er alment kent, at Arnarnes er dýrasti býlingur í Íslandi at festa búgv í, og tað fekst eisini eitt prógv fyri nú um dagarnar. Tá kom fram, at eitt 3.630 fermetrar stórt byggilendi er lýst til sølu fyri smáar 50 milliónir krónur - í okkara pengum. Orsøkin er sambært bløðunum, at útlendskur keypari liggur framvið at keypa.



*Arnarnes er dýrasti býlingur í Íslandi at festa búgv í*
*(Mynd: Vísir)*

## Ísland lítlan áhuga

Danskir fjølmiðlar plaga at gera nógv burtur úr íslendskum búskaparmálum, men tá íslendingar nú um dagarnar skipaðu fyri einari ráðstevnu í Keypmannahavn um íslendskan búskap, høvdu donsku fjølmiðlarnir so lítlan áhuga, at dagin eftir var ikki ein stavur í nøkrum blaði um tiltakið. Bara TV2 gjørdi eina samrøðu við Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, uttanríkisráðharra. Summir íslendingar halda kortini, at tiltakið var ov illa fyriskipað.

# Neyðtók seks ára gam

**Hálvtannað ár í fongsul var úrskurðurin hjá Eystara Landsrætti í gjár, tá rætturin viðgjørdi eitt mál um kynsligan ágang móti børnum. Serliga grovt metti rætturin eina fullførda neyðtøku av tí tá seks ára gamla hálvbróður tann ákærda. Misnýtslan byrjaði longu áðrenn ákærdi fylti 15 ár og vardi í minst fýra ár**

MISNÝTSLA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Hetta er tað ringasta, eg havi verið við til!

So dýran tók abbi til neyðtikna dreingin til, tá ákærurnar vórðu lisnar upp móti tí nú 20 ára gamla unglinginum, sum í einum tíðarskeiði frá 28. august 2002 fram til august 2005 var ákærdur fyri fimm misbrot móti børnum.

Sambært ákærunum hevði ungi drongurin í fleiri førum framt kynsligan ágang móti børnum heilt niður í fimm-seks ára aldur. Ákæruritið fevndi eisini um § 210, ið umrøður incest (kynslig samvera millum familjulimir), tí tann, ið varð oftast og grovast útsettur fyri áganginum, var yngri hálvbróður til tann ákærda.

Í øðrum lagi var hann ákærdur fyri kynsligan ágang móti tveimum systkinabørnum, einum 9-ára gomlum dreingi og einari 7-ára gamlari gentu.

Trý tey fyrstu forholdini umrøddu kynsligan ágang móti hálvbróðrinum, meðan forhold fýra og fimm vóru móti ávikavist 7-ára gomlu gentuni og 9-ára gamla dreinginum.

Í Føroya Rætti varð unglingin dømdur fyri trý tey fyrstu forholdini, men fríkendur í teimum seinastu tveimum. Av tí at hin ákærdi er so ungur, dømdi Føroya Rættur hann bert treytaðan dóm við royndartíð. Hetta var ákæruvaldið ikki nøgt við og skjeyt málið inn fyri hægri rætt. Og Eystari Landsrættur skuldi vísa seg ikki at vera so mildur.

### Sálarliga plágað

Eftir at dómurin í Føroya Rætti var kunngjørdur, varð eisini ein sálarlig meting av børnunum, sum ein sálarfrøðingur hevði gjørt og skrivað, lisin upp. Út frá hesi frágreiðing kom týðiliga fram, at børnini vóru illa fyri sálarliga, og at hendingarnar høvdu sett djúp spor í teirra barnasinni.

Hálvbróðurin var tann, sum hevði fingið drúgvastu sálarligu hjálpina. Fram til frágreiðingin varð gjørd í juli 2007, hevði hann fingið 17 viðgerðir, og hesar hildu fram eftir henda dag.

Hálvbróðurin var plágaður av bangilsi, hevði havt trupulleikar við svøvni, var ræddur fyri at møta hálvbróðrinum í býnum og hevði havt »flash-backs« av hendingunum.

Gentan hevði nógva skuldarkenslu og gav sær sjálvum skuldina fyri, at hon ikki megnaði at standa ímóti kynsliga áganginum, og ikki hevði klárað at vart seg sjálva nóg væl.

Bróður hennara var somuleiðis illa fyri av hendingini og bæði ræddust tey reaktiónina hjá tí ákærda.

Sjálvar vitnisfrágreiðingarnar hjá børnunum vóru tiknar upp á dvd og spældar av í rættarsalinum, men hetta fór fram fyri afturlætnum hurðum, og tí er ikki greitt fyri almenninginum, hvussu børnini hava upplivað hesar hendingarnar. Men smá brot komu tó fram í rættarfrágreiðingini hjá ákæranum í málinum, Honnu Vang, og í ákæruritinum, sum somuleiðis varð lisið upp.



*Mest álvarsliga ákæran var ein fullførd neyðtøka av hálvbróðrinum*
*Modelmynd: Jens Kristan Vang*

### Kompliserað

Fyrsta vitni í málinum var mamma at forórættaða hálvbróðrinum. Hon hevði verið gift pápa at ákærda, men hon rýmdi frá honum, tá tað kom fram, at hann sjálvur hevði verið ónærisligur móti elstu gentuni, tey áttu saman. Hetta málið er nær tengt at sonevnda Jenis-málinum.

Pápin at ákærda – og fyrrverandi maður hjá mammu drongsins og pápi – slapp bert at síggja ákærda 14. hvønn dag og bert við øðrum hjástaddum. Men sum tíðin leið, varð slakað á hesum øki. Mamman greiddi frá, at hon ongantíð hevði órað nakað ilt viðvíkjandi soni til mann sín.

Víðari greiddi mamman frá, at hon fyrstu ferð hoyrdi nakað grett um málið um Ólavsøkutíð 2006, eftir at hon var flutt frá manni sínum. Hon greiddi børnunum frá, at hon rýmdi frá pápa teirra, tí hann hevði gjørt nakað móti elstu systrini, sum man ikki mátti gera móti børnum.

Sonurin svaraði, at hann væl visti, hvat tað var, tí hálvbróðurin hevði gjørt tað sama við seg.

Stutt eftir hetta meldaði mamman sonin hjá mann-